


*Mynd: Álvur Haraldsen*

# H71 steðgaði upp

**HONDBÓLTUR** Avrikið í seinna hálvleiki var als ikki nøktandi, tá VÍF streyk avstað og vann tvey kærkomin stig

Uni Holm Johannesen

H71 var við yvirlutan í fyrra hálvleiki og tókist hava fult tamarhald á støðuni.

Hoyvíkingar spældu væl, og gestirnir úr Vestmanna stríddust fyri at renna aftaná. Tað eydnaðist væl, tí heimaliðið setti ongantíð VÍF av.

Fimm mál skiltu liðini, tá munurin var størstur.

Hálvleiksstøðan var 13-12 til H71.

### Steðgaðu upp

Tað sum riggaði væl hjá H71 undan steðginum, riggaði als ikki í seinna hálvleiki.

Hoyvíkingarnir vóru lítið sannførandi. Teir framdu fleiri mistøk í álopsspælinum, og tað var lítið veiggj í verjupartinum.

Vestmenningar fóru upp í leikferð. VÍF streyk avstað og vann tvey kærkomin stig, sum lyftir teir upp á triðja plássið í deildini.

Sigurin var uppiborin.

# Team Klaksvík – StÍF í kvøld

Seinati landskappingardysturin hjá monnum í hesum umfarinum verður avgreiddur í kvøld.

Botnliðið Team Klaksvík fær vitjan av StÍF, sum er næstniðast. Dysturin byrjar klokkan 19.15 í Badmintonhøllini í Klaksvík.

Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen døma.

*uni@sosialurin.fo*

### Neistin – KÍF 34-24 (17-16)

Høllin á Hálsi, Tórshavn
Dómarar: Martin Gomér og Johan Gomér

**10 min.: 5-10**
**20 min.: 10-16**
**40 min.: 23-18**
**50 min.: 27-22**

**Neistin:** Jugoslav Djumic 7, David Edvardsen 7, Áki Mørk 7, Finnur Hansson 5, Heini Hanusarson 4, Ingi Olsen 2, Sjúrður Thomassen 2.
**KÍF:** Arnbjørn T. Hansen 6, Sverri Reinert 4, Gert Hansen 4, Ási Dam 3, Ingi Johannesen 2, Pætur Johannesen 1, Teitur Joensen 1, Tony Weihe 1, Rúni Joensen 1, Jákup Trygvason 1.

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 10 | 351 | 264 | 87 | 19 |
| 2 | KÍF | 10 | 286 | 252 | 34 | 15 |
| 3 | VÍF | 11 | 301 | 276 | 25 | 10 |
| 4 | Kyndil | 9 | 236 | 224 | 12 | 10 |
| 5 | H71 | 10 | 270 | 272 | -2 | 10 |
| 6 | StÍF | 8 | 185 | 196 | -11 | 4 |
| 7 | Team Klaksvík | 10 | 216 | 361 | -145 | 0 |




*Rutinan var á muni tá ungu kollfirðingarnir taptu greitt móti Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# KÍF manglaði rutinu

**HONDBÓLTUR** Agnar Joensen, Regin Petersen, Niklas Reginsson og Andreas Nielsen vóru ikki við hjá KÍF, og tað er merkist. – Vit mangla rutinu í dag, sigur Jan Ottesen, sum harmast um, at kollfirðingar mistu greiðu leiðsluna

Uni Holm Johannesen

Tað var líkt til, at Neistin skuldi tapa fyrsta dystin í hesum kappingarárinum, tá tólv minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki.

Kollfirðingar høvdu fullkomiliga tamarhald á støðuni. Teir vóru framman fyri við sjey málum – 16-9 – og høvdu beina kós móti einum sigri. Greipuvinnararnir høvdu torført við at verja fyri hugflogsríka og kvika álopsspælinum hjá KÍF.

Men so steðgaðu kollfirðingar upp. Næstu 17 minuttirnar fekk Neistin 13 mál, og KÍF fekk bara eitt.

– Tað er torført at seta orð á, hvat gongur galið. Vit eru helst troyttir, tí vit eru ikki líka avgjørdir. Neistin vaknaði eisini av álvara, tá teir sóu, hvønn veg tað bar, sigur Jan Ottesen, sum er venjari hjá KÍF.

### Rutinumunur

Agnar Joensen, Regin Petersen, Niklas Reginsson og Andreas Nielsen vóru ikki tøkir hjá kollfirðingum leygardagin.

Tað merkist sjálvsagt. Tað eru fýra av spælarunum, sum hava gingið undan seinastu vikurnar.

Teirra royndir manglaðu av álvara, tá Neistin so smátt byrjaði at vinna leiðsluna aftur.

Tað sigur Jan Ottesen.

– Vit spældu nærmast við einum unglingaliði í dag. Hóast vit tapa greitt, so vísir dysturin í dag, at vit eru væl á veg. Tá eg tók við venjarastarvinum í fjør, ætlaði eg, at KÍF skuldi stríðast um gullið um trý ella fýra ár. Tað hevur gingið skjótt, og vit vilja gjarna vera favorittar at spæla finalurnar móti Neistanum, sigur Jan Ottesen.

### Nýggir dómarar

Tvíburðarnir Martin Gomér og Johan Gomér úr Svøríki dømdu landskappingardystin á Hálsi leygardagin. Hondbóltssambandið hevur fingið teir at døma dystirnar. Teir stóðu væl og virðiliga royndina.

*uni@sosialurin.fo*